# Bønaráheitanir fyri januar 2023

1. Gud, ger, at kvinnur í Uruguay kenna seg virðismettar, og ikki lata onnur misnýta tær til sína egnu frægd fyri peningaligan vinning. (Sálm. 34:6**-7**, ensk 7-8).
2. Vit prísa tær, Gud, fyri fólkið í Bonaire, ið luta vitnisburð sín á Facebook síðu okkara. Mátti vitnisburður teirra givið øðrum vón. ( Sálm. 66:16)
3. Harri, ger, at boðskapurin hjá *Kvinnur við Vón* á fjølmiðlum, ið Kanada hevur býtt út til lond um allan heim, geva lurtarum frið, grøðing og samband við Teg. (Es. 55:10-11)
4. Harri, ger, at You Tube rás okkara, ið sendir sjónbandaðar andaktir hvørja viku á teknmáli, kann draga fleiri kvinnur í Brasil til Tín og hjálpa teimum at vaksa í trúnni. ( 2. Pæt. 3:18)
5. Gud, ger tað møguligt hjá toymi okkara í Paraguay, sum hevur eitt ynski um at víðka um radiosendingarnar inni í landinum gjøgnum sendingar á sponskum, týskum og guarani. (Esaias 54:2)
6. Faðir, ger at fleiri sjálvboðin, ið eru íðin fyri Teg at náa út til onnur, koma at hjálpa toymum okkara í ymsum økjum í USA, í tí arbeiði, Tú hevur givið teimum. (1.Jóhs.br. 3:18)
7. Harri, vit biðja um miskunn Tína fyri kvinnur í Honduras, ið líða undir harðskapi í heimunum. Ger ein útveg fyri tær úr hesum roynslum. (Es. 25:4)
8. Faðir, vit biðja fyri kvinnuligu fangunum í Dominikanska Lýveldinum, at tær hoyra evangeliska boðskapin og verða sáttar við Teg og finna frælsi í samfelagnum við Teg. (Áp.3:19)
9. Harri, gev kvinnunum í Honduras frið, ið eru latnar einsamallar eftir, tí børn og menn teirra rýma til onnur lond undan fátækdømi og kriminaliteti í sínum egna heimlandi. (Fil. 4:6)
10. Gud, vit prísa tær, at menn og kvinnur í Bonaire hava fingiðeitt inniligari samfelag við Teg ávirkað av tænastuni hjá TWR *Kvinnur við Vón*. (Orð. 3:5-6)
11. Góði Gud, gev einligum mammum í Brasil, ið verða noyddar at arbeiða og taka sær av familjuni, stuðul og sterk trygdarnet. (Gal. 6:2)
12. Faðir, vit prísa Tær fyri bønarsvar, at Tú hevur givið toyminum í Paraguay møguleika at bera orð Títt til ungu kvinnurnar í einum ungdómsfongsli. (Gal. 6:9)
13. Faðir, gev toymunum í Kanada førleika at síggja og seta í verk nýggjar møguleikar, ið Tú veitir teimum til at náa út til kvinnur í landi teirra. (1.Pæt. 4:10)
14. Gud, vit biðja fyri tannáringagentum í Uruguay, ið umhugsa sjálvmorð. Lat tær í Tær fáa hug til at liva. (Sálm. 42:12; ensk 42:13)
15. Faðir, gev altjóða toymisleiðarum okkara vísdóm, nú teir fara undir fyrireikingar at menna og framleiða *Dýrabør og Elskað*, ið er nýggja *Kvinnur við Vón* sendingin hjá TWR. (Orðt.2:6)
16. Faðir, vek upp tilkomnar, gudsóttandi kvinnur í Brasil, ið kunnu eggja øðrum kvinnum at tæna Tær. (Matt.28:19-20)
17. Góði Gud, lat ungar kvinnur og gentur í Kolumbia, ið eru komnar í samleikakreppu, søkja inn at hjarta Tínum og mynda seg til at verða verandi, sum tær eru**.** (1. Jóhs.br. 3:1)
18. Gud, Faðir, fólkið í Bonaire veit, at góðir leiða**rar** koma frá Tær. Gev teimum skynsemi at taka rættar avgerðir. (Matt. 20:26)
19. Vit prísa Tær, Gud, at toymið í Paraguay nú kann luta orð Títt í ein minutt videoupptøkum á guarani-máli á sosialum miðlum. (Matt.4:4)
20. Faðir, lat ikki kvinnur í Panama verða lokkaðar í skøkjuvinnu, sum er ólóglig, við tølandi tilboðum um arbeiði uttanlands við góðari løn. (Orðt.19:20)
21. Faðir, varðveit og grøð kvinnurnar og børnini í Uruguay, ið eru úti fyri harðskapi í familjuni. Broyt hjørtuni á teimum, ið skaða tey. (Sálm. 28:6-7)
22. Faðir, gev kvinnum í Brasil atgongd til útbúgving og góðar arbeiðsmøguleikar. Drag tær tætt at Tær og styrk tær, meðan tær taka sær av familjum sínum. (Sálm. 145:15)

23. Faðir, nógvar kvinnur í Honduras líða, tí tær síggja børn síni koma sær upp í brotsmanna-harkalið. Set hesi ungu í frælsi frá misskiltu atdróttarmegini til lívið hjá hesum harkaliðum**.** (2. Kor. 5:17)
24. Faðir, gev staðbundnu toymunum í USA hjørtu, ið altíð vilja dýrmeta Teg og líta á Teg í øllum tí, tey gera. (Es. 41:13)
25. Faðir, opna dyr og útvega tað, ið tørvur er á til tænastuna hjá TWR Kvinnur við Vón í Paraguay, at náa kvinnur í fongsli við frelsuboðskapinum í Jesusi Kristi. (1. Kor. 15:10)
26. Gud, vit biðja, at kvinnurnar í Uruguay koma at kenna Teg og skilja, at tær eru Tær dýrabarar, og læra at virða seg sjálvar. (Es. 62:3)
27. Faðir, takk fyri mongu møguleikararnar TWR *Kvinnur við Vón* í Brasil kunnu tæna á kvinnu-stevnum og øðrum tiltøkum. Styrk kvinnurnar og lat kærleika teirra til Tín vaksa. (Ef. 1:17)
28. Faðir, signa toymið í Paraguay við frívillugjálvbodnum fólkum og gevarum, so at bønar-kalendarin kann verða týddur og framleiddur til guarani málið í ár. (Sálm. 112.5)
29. Gud, vit biðja, at kvinnurnar í Peru hoyra evangeliska boðskapin. (Róm. 10:17)
30. Vit prísa Tær, Gud, at toymi okkara í Uruguay kann senda bønarkalendarar gjøgnum fjølmiðlar, og kunnu hittast at biðja saman gjøgnum internetið. (Sálm. 118: 1)
31. Grøð og endurreis, Harri, kvinnurnar í Dominikanska Lýveldinum, ið líða undir harðskapi í familjuni. (Es. 33:2)

## Peggy Banks skrivar

Halló kæru vinir

Eg vil siga tykkum nøkur spennandi tíðindi, men tað er við sorgblídni. Eg fari at flyta úr starvinum í TWR *Kvinnur við vón* í januar 2023 til at arbeiða í einari tænastu fyri forfylgd sum næsthægsti leiðari í Global Assistance (Alheims Stuðul). Gud hevur nomið við hjarta mítt, so at eg kundi verða før fyri at hoyra hetta kallið og fylgja tí í einari tíð sum hesari https://www.persecution.org. Eg fái tað serstaka høvið at arbeiða saman við og geva nøkrum einastandandi leiðarum í næsta ættarliði útbúgving í alheims arbeiði og neyðstøðuhjálp**.**

Eg fái ikki sagt hvørjari einstakari av tykkum, hvussu nógv tykkara vinskapur og leiðaraskapur hevur havt at týða fyri meg í heimsumfatandi arbeiðinum í TWR *Kvinnur við Vón*. Eg virðismeti hvørja einastu av tykkum og tykkara hjarta fyri teimum líðandi og mikilsverdu trúboðanartænastuni ígjøgnum miðlunum til at náa heimin fyri Kristus. Tað hevur verið ein tann størsta gleði hjá mær at arbeiða saman við hvørjari einstakari av tykkum í trúboðanartænastuni hjá TWR Kvinnur við Vón.

Eg virðismeti tykkara bønir og framhaldandi arbeiði saman við okkara álítandi økis samskiparum í TWR Kvinnur við Vón. Tit eru øll ídnir og stórfingnir leiðarar, og eg veit, at Gud fer at brúka hvønn einasta av tykkum á mikilsverdan hátt, sum tit halda fram at bera vón í Jesusi til kvinnur um allan heimin og tvørturum ættarlið.

Eg eri tilreiðar at svara, um tit hava nakrar spurningar. pbanks@twr.org

Signingar

Peggy

**”Høvuðsstuðulin undir øllum kristiligum arbeiði er bøn” (Eeva Vähäsarja)**

*KVINNUR VIÐ VÓN* **twrwomenofhope.org**

**Fíggjarstuðul:**

**EvR hevur stovnað nýggja konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR. –**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR. –**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia –– twre@twr.org**